## Jólaskipið kemur á Havnina í annakvøld

Í morgin kl 17 kemur jólaskipið á Havnina. Lagt verður at í Vágsbotni, og vanliga eru nógv fólk og taka ímóti. Hesaferð kemur jólaskipið eftir at skúlarnir hava fingið frí, og tí rokna tey á Kunningarstovuni, at nógv fólk fara at taka ímóti. Í morgin millum kl 14 og 16 vitjar Nósi í miðbýnum, og framsýningin "Minnist tú" í Degns húsi er opin frá kl 14-18. Frá kl 15-20 verður andlitsmáling í Tinghúsgarðinum – og kl 17 leggur jólaskipið at í Vágsbotni undir Bryggjubakka. GHM fer at spæla, og jólamenninir vitja miðbýin. Kl 19 syngur Kamarkóri í miðbýnum.



# Genkanning av toskastovnum fyrsta verkætlan

**Fiskaaling við Áir hevur fingið nýggja starvsstovu, og teir eru longu farnir undir fyrstu verkætlanina. Hetta er ein kanning, sum skal staðfesta munin á landgrunnstoski og toskinum á Føroya Banka**

GRANSKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Hannes Gislason er granskingarleiðari á Fiskaaling við Áir*



So hvørt, sum tørvurin innan alivinnuna broytist, verður arbeiðið hjá Fiskaaling laga til broytta tørvin.

Tá Fiskaaling varð sett á stovn í 1970, vóru fyrstu uppgávurnar at menna framleiðslumannagongdir og at kanna, hvørjir møguleikar vóru fyri lønandi aling í Føroyum. Tá so verulig gongd kom á alingina, broyttist uppgávan hjá felagnum til at fáa til vega dygdargott alitilfar sum rogn, yngul og smolt.

Fyri at fjøltátta føroyska aling, fór Fiskaaling í 1998 undir miðvísar royndir at ala kalva. Støð er bygd í Nesvík, har møguleiki er at gera royndir við aling av marinum fiskasløgum.

Í 2000 tók nevndin í Fiskaaling avgerð um at leggja størri dent á granskingar- og menningarvirksemi í alivinnuni í Føroyum. Í 2004 varð so gjørt av aty steðga við kynsbótaarbeiðinum, tí tað lønti seg ikki longur samstundis sum hetta kundi flytast inn. Í 2005 varð so ein granskingarleiðari settur, og síðani november 2006 hevur verið arbeitt við at fáa nútímans starvsstovu upp at standa.

Og í síðstu viku var so móttøka í sambandi við, at hetta arbeiði var liðugt.

Fyrsta verkætlanin er at gera kanningar av landgrunnstoski og toski av Føroya Banka at kanna munin á stovnunum, og eisini at kanna eftir, hvør vakstrarmunurin er.

Hetta er ein verkætlan, sum gongur yvir nøkur ár. Ætlanin er at seta tveir og tveir lívfiskar saman í smærri kørum og soleiðis gera 20 familjur av hvørjum stovni, og síðani lata hesar vaksa saman í størri kørum undir somu umstøðum og sama umhvørvi.

- Talan er um eina PhD-verkætlan, har vit hava fingið 678.000 krónur í granskingarstuðli frá Granskingarráðnum, sigur granskingarleiðarin, Hannes Gislason.

### Kynsbúning ávirkar vøksturin

Fiskaaling hevur fingið til vega 93 toskar av landgrunninum.

- Seinni skulu vit so fáa til vega tosk av Føroya Banka, men hann er eitt sindur trupul at fáa fatur á hesa tíðina, so tað verður ikki fyrr enn komandi vár, at vit fáa tosk av tí stovninum, sigur Hannes Gislason.

Tað eru ávísar kanningar gjørdar áður, og hesar vísa, at toskurin av Føroya Banka veksur skjótari enn landgrunnstoskurin.

- Men tað er neyðugt at útbyggja hesar kanningarnar. Hvør er munurin genetiskt, og hvussu er vakstrarmunurin og kynsbúningin, tað eru spurningar, sum kanningin skal geva svar upp á, sigur Hannes Gislason.

Hetta skal so gerast eftir common garden prinsippinum, har tú alir toskin upp undir kontrolleraðum og eins umstøðum.

Men granskarar vita longu, at kynsbúningin ávirkar vøksturin hjá toski.

- Tað er soleiðis, at tá toskurin verður kynsbúgvin, steðgar vøksturin. Í Hvalba hava teir gjørt royndir, har teir nýta nógv ljós, og hetta ger, at toskurin gerst seinni kynsbúgvin, og harvið veksur meiri, sigur Hannes Gislason.

Hetta er eisini nakað, kannast skal, nevniliga hvussu tíðliga toskurin kynsbúnast, tí royndir sum nevnt vísa, at seinni toskurin verður kynsbúgvin, longri veksur hann.

### Gýta ikki í senn

Longu sum er vita teir, at ávísir munir eru á Føroya Banka toskinum og landgrunnstoskinum.

- Teir báðir stovnarnir gýta jú ikki í senn. Landgrunnstoskurin byrjar at gýta í februar og toppar seinnapartin av mars, meðan toskurin á Føroya Banka gýtir og toppar tríggjar-fýra vikur seinni. Og tað er sjálvandi eisini nakað, vit mugu taka hædd fyri í kanningunum, sigur Hannes Gislason.

Veruligu royndirnar byrja ikki fyrr enn í 2009, tí fiskurin skal hava verið í fangaskapi í eitt ár, áðrenn byrja verður.

Talan verður annars mest sum at bróta upp úr nýggjum.

- Vit byrja mest sum av nýggjum. Tað hava verið tíðarskeið, har granskað hevur verið, og tað var eisini ein starvsstova, men nústaðni eru umstøðurnar veruliga til staðar. Samstundis hevur nevndin jú eisini skift strategi so størri dentur nú verður lagdur á gransking, sigur granskingarleiðarin á Fiskaaling.

Tað er eisini við hesum fyri eyga, at tað frá 1. januar 2008 verða knýtt seks fólk at granskingardeildini. Umframt leiðaran sjálvan eru Durita Nielsen, PhD, sett 1. august 2006, Petra Hansen, PhD-lesandi, sett 1. august 2007, Ása Jacobsen, M. Sc, sett 1. august 2007 og Øystein Patursson, PhD, settur 1. januar 2008.

Umframt hesi er eisini ein ráðgevi knýttur at starvsstovuni, Geir Dahle, sum hevur 20 ára royndir á økinum.

Hartil koma øll tey, sum annars starvast á Fiskaaling, fólk, ið eru von við at ansa og røkta fisk.

### Betra umhvørvið

Hendan verkætlanin at kanna toskastovnarnar undir Føroyum er ein PhD-verkætlan, og slíkar ætlanir